# Dráttur-kappingin



Hjá gentum 10 gjørdist Fleyr vinnari av kappingini framman fyri Mjølnir og KÍF



A-liðið hjá fuglfirðingum vann gull hjá yngstu dreingjunum. Fuglfirðingar vunnu eisini silvurmerkið, meðan ÍF varð nummar tvey og SÍ nummar trý



Mjølnir vann kappingina fyri gentur 12. Nummar tvey og trý gjørdust ávíkavist SÍb og SÍa



ÍFa vann eisini kappingina hjá næstyngstu dreingjunum. Har vann Dráttur silvur og ÍFb bronsu



Kappingina fyri gentur 14 vann SÍ frammanfyri Drátt og TB



Klaksvíkingar tóku sær av heiðursmerkjunum hjá dreingjum 14, har SÍ og ÍF endaðu á næstu plássunum

## Seinasta av teimum trimum steypakappingunum fyri yngri lið er nú liðug

FLOGBÓLTUR

*Jákup Mørk*

Árliga steypakappingin hjá flogbóltsfelagnum í Vágum, Drátti, fyri børn og ung, hevur verið á Giljanesi. 71 lið høvdu teknað seg til kappingina í aldursbólkunum frá 10 ár og upp til unglingaaldur hjá bæði gentum og dreingjum. Eins og tað varð gjørt í Mjølnir kappingini, varð kappingin býtt upp, so tað betri skuldi bera til at fáa allar kappingarnar avgreiddar. Yngru brønini høvdu soleiðis eitt vikuskifti fyri seg, meðan tey eldru fingu næsta vikuskiftið.

Myndir av vinnandi liðunum síggjast aðrastaðni á síðuni. Undantikið eru tó vinnararnir av mansunglingadeildini, har tað tíverri ikki hevur eydnast okkum at fáa mynd. Her gjørdist SÍa annars vinnari framman fyri Fleyr. SÍb endaði á triðja plássinum.

### Trupulleikar við ferðing

Kappingin á Giljanesi er annars seinasta av teimum trimum steypakappingum fyri tey yngru, ið feløgini Dráttur, Mjølnir og Fleyr skipa fyri. Árliga føroyameistarakappingin fyri tey yngru verður í Havn 29. og 30. mars.

Stóri fyrimunurin við hesum kappingarháttinum er, at talan verður um nógvar dystir, tá kappingarnar eru, soleiðis at ferðinin hjá einstøku liðunum verður munandi minni, enn hon vildi verið, um talan var um vanliga landskapping.

Hóast kappingarnar hava hilnast væl, so harmar tað fyrireikarnar, at skipanin við Bygdaleiðum ikki longur riggar eins væl.

Úr Drátti verður sagt, at tað er ein stórur bági fyri feløgini, at tey ofta fáa noktandi svar, tá søkt verður um at fáa barnaliðini við bussunum. Ikki minst tí svarið aloftast kemur somikið seint, at lítil og eingin tíð er til at leggja alternativar ferðaætlanir til rættis. Og so er tað eisini munandi dýrari hjá feløgunum, tá tey ikki hava møguleika at nýta ÍSF-skipanina til fluting av ferðafólki.

### Fyri vaksin

Hjá teimum vaksnu plagar kappingarárið vanliga at enda við kappingini á Giljanesi, og soleiðis verður eisini í ár.

Leygardagin 22. mars verður kappingin hjá Drátti á Giljanesi, har kvinnur og menn í teimum trimum vaksnamannadeildunum fara kappast, hugna sær og yvir høvur líta aftur á kappingarárið, sum nú er farið.



SÍ vann eisini kappingina í kvinnuunglingum, har TB fekk annað, og Dráttuir triðja plássið




## Akfør og prutl við skaða til sølu

**Merki:** Daihatsu Charade – 5 hurðar
**Árg.:** 04.11.1991
**Km:** 68.801
**Sak nr.:** 16876/15687

Bilurin verður seldur sum hann stendur nú. Og kann síggjast á deildini hjá T. F. í Vági.

**Merki:** Derbi Senda SM
**Árg.:** 18.09.2001
**Km:** 8.983
**Sak nr.:** 13203/12204

Prutlið verður selt sum tað stendur nú. Og kann síggjast á deildini hjá T. F. á Tvøroyri.

**Merki:** CPI Hussar JR
**Árg.:** 29.05.2002
**Km:** 5.112
**Sak nr.:** 12230/11280

Prutlið verður selt sum tað stendur nú. Og kann síggjast á deildini hjá T. F. á Tvøroyri.

**Sýnsmaður:** Magnus E. Joensen
tlf. 34 56 66 ella 37 38 90 · fax nr. 37 31 17
mj@trygging.fo
Er at hitta millum kl. 8.00 og 10.00

**Merki:** VW Golf 1.9 D
**Árg.:** 1995
**Sak nr.:** 13201/12202

Bilurin verður seldur sum hann stendur nú. Og kann síggjast á deildini hjá T. F. í Saltangará.

**Sýnsmaður:** Suni Danielsen
tel. 34 56 83 – fartel. 22 53 70
sd@trygging.fo
Er at hitta millum kl. 8.00 og 10.00

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR **Tlf. 345600 Fax 345607**

Flyting

## Farmaleiðir flyta




**Mánadagin 10.mars flyta farmaleiðir í onnur hølir. Sí tekning.**




STRANDFARASKIP LANDSINS

**www.ssl.fo · 34 30 00**

Til Hvannasunds kommunalu Dagrøktarskipan verður við hesum søkt eftir:

## Leiðara við námsfrøðiligari útbúgving

At byrja 1. apríl 2003 ella skjótast gjørligt.

Talan er um 3/4-tíðar starv.

Lønar- og setanartreytir eru sambært sáttmála millum FKA og Føroya Pedagogfelag.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Gunvør Eliasen á telefon 226360.

Umsóknir verða at senda til: Hvannasunds kommunu, 740 Hvannasund

og skulu verða kommununi í hendi **í seinasta lagi 15. mars 2003.**

**Hvannasunds kommuna**

## Sethús í Havn til sølu

**Javnagøtu 10**



Húsini eru í 2 hæddum, hvør 120 fermetrar og standa í barnavinarligum, friðarligum umhvørvi við góðum útsýni.
Báðar hæddir eru innrættaðar, við íbúð í niðaru hædd. Grundøkið er uml. 500 fermetrar.
Uttanum húsini er stoyptur garður við trægirðing.
Byggiár: 1983.
Kostnaður: kr. 1.875.000

Áhugað kunnu ringja

**tlf. 322424 ella 254637**

Vegna Tryggingarfelagið TRYGD verður hesin bilur við stórum skaða lýstur til sølu:

Merki: VW Polo
Model: Classic Diesel
Árg.: 08/2000
Litur: Grønur

**Bilasølan**
**v/ Øssuri Johannesen**
Vegurin Langi · Postboks 3192
110 Tórshavn · Tlf. 315354

## Handilshølir í Havn

150 m2 til leigu nær miðbýnum.

Kann brúkast til handil, skrivstovu, goymslu, ella til undirvísing.

**Ring 221577**